# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Christian Olsen fyllir seksti ár

Mikudagin tann 26. juli fyllir Christian Olsen, leiðari á Norðoya Kunningarstovu í Klaksvík, seksti ár.

Christian varð føddur tann 26. juli 1946 í Fuglafirði. Foreldrini vóru Heini Oløsen úr Klaksvík (Heini hjá Hans Eriki) og Solby Árna Thomsen ættað úr Fuglafirði.

Christian er elstur av fimm systkjum og vaks upp á Selheyggi í Klaksvík. Tá hann varð liðugur við realskúlan, fór hann í bankalæru í Føroya Banka.

Í 1968 giftist Christian við Sólfríð Svabo Sørensen, dóttir Søren Svabo og Janhild Ulrikku Sørensen. Tey eiga fýra børn, Heini, Janhild, Søren og Solby. Abbabørnini eru fimm í tali: Jordan, Jack, Lily, Petur Martin og Kristian.

Miðskeiðis í sjeytiárunum bygdu Christian og Sólfríð hús á Gørðum í Klaksvík, har tey búgva enn.

Flestu klaksvíkingar munnu minnast Christian frá tíðini á matvøru- og provianthandlinum, Seglhúsið, har hann arbeiddi í 17 ár, inntil hann í 1984 tók við starvi sum stjóri á Nordafar A/S í Føroyingahavnini í Grønlandi.

Í 1989 fór hann í starv hjá Smyril Line umborð á Norrønu sum goymsluleiðari og seinni sum pursari. Sum flest øllum kunnugt var Norrøna eitt tíðarskeið "flóttafólkaskip" og lá við Islandsbrygge í Keypmannahavn vetrarhálvurnar, og var Christian eisini ein partur av manningini hesa tíðina.

Í land aftur komin tók Christian við starvinum sum leiðari av Norðoya Kunningarstovu, sum varð endurstovnað 1. mars 2001, og røkir hann framvegis hetta starvið.

Christian Olsen hevur eisini luttikið nógv innan føroyskan fótbólt. Hann bleiv valdur inn í fótbóltsdeild FSF´s í 1976 og var við til at stovna Fótbóltssamband Føroya í 1979, har hann varð fyrsti formaður sambandsins.

Í politikki hevur Christian altíð verið javnaðarmaður, og hevur hann eisini sitið í Klaksvíkar býráði umboðandi flokkin. Hetta gjørdi hann tvær býráðssetur – frá 1980 til 1988.

Christian hevur altíð verið ein eldsál, sum brennur fyri tí, hann arbeiðir við. Tað veri seg innan dagliga starvið, politikk ella felagsarbeiði. Tískil eru feløgini og nevndirnar, sum hann hevur verið uppii gjøgnum tíðina, alt ov rúgvismikið at nevna her. At hann eitt skifti varð



kallaður Nevndar-Christian sigur allarhelst nógv meira enn ein long ramsa.

Christian Olsen verður burturstaddur á føðingardegnum.

Hjartaliga til lukku við degnum.

**Ynskja konan, børnini, verbørnini og abbabørnini**

## Oliver Joensen 60 ár

Hann vaks upp í einum livandi og altjóðagjørdum umhvørvi. – Har mátti okkurt stórt koma burturúr.

Ofta verður sagt, at tú ert "produkt av tíni samtíð". Tað haldi eg ber til at siga um Oliver Joensen, sum nú hevur, vit kunnu siga við hepnari hond, rikið Norðlýsið nógv longri enn nakar annar blaðstjóri fyrr hevur gjørt, hóast teir í so máta vóru drúgvir.

Oliver, sum nú um dagarnar fylti 60 ár, vaks upp í spennandi umhvørvi við Dávamonnunum og síðani Petur Juul Samuelsen, Erling Laksáfoss, Peturi á Hædd, Bernhardi Brim nakað longur niðri og Herluf Thomsen. Skamt frá var bilstøðin hjá Hjørleif Waag Høgnesen, har lív var í. – Sum næsta granna hevði hann Haldur Holm, sum byrjaði bakarí uppi í kjallaranum hjá Oluffu Joensen og so Niels Michael Knudsen.

At hann gjørdist okkara Maxwell og Murdoch var einki at siga til í tílíkum livandi og altjóða,



spennandi og mennandi umhvørvi. Hann mátti gerast víðskygdur, hóast lokalur.

Tað skal ikki lítið til, at geva lokalblað út viku eftir viku, mánað eftir mánað og ár eftir ár. Tað hevur hann evna, gløggur sum hann er.

### Útbygdi tíðindatænastuna

Samstundis skal sigast, at seinastu tíðina er blaðið komið út ikki færri enn tvær ferðir um vikuna, samstundis sum heimasíðan er ein hin mest upplýsandi og ein tann mest vitjaða í landinum. Verður tíðum endurgivin av Útvarpi Føroya, Rás 2 og av øðrum fjølmiðlum.

Mong eru lokalbløðini, sum hava sæð dagsins ljós, men eru givin á hendur, tá ein tíð er fráliðin. Soleiðs var eisini fyrr, áðrenn Oliver tók við sum blaðstjóri og ognaði sær blaðið, tá vóru í fleiri umførum uppiløgur, men hann hevur verið áhaldin. Tað var ofta tikið til, at: "Norðlýsið kemur altíð aftur".

Fyri Klaksvík, hevur Norðlýsið havt stóran týdning, hevur styrkt um samanhaldi bæði í vinnu, mentan, á politiska pallinum og so sum serstakur táttur verður skrivað nógv um ítrótt.

Eina tíð helt Rás 2 til á Norðlýsinum, haðani mangar áhugaverdar sendingar komu

Av og á havi eg sagt við Oliver, at kiloprísurin á Norðlýsinum er nakað hægri enn á New York Times, men fyri lokalsamfelagið í Klaksvík, hevur tað sanniliga eisini havt so mikið størri týdning.

Eisini er nokk so nógv stuttligt, sum er komið fyri í blaðnum. Eitt dømi, ta Norðoyastevnuna, út móti hægstu summartíð, tá Norðlýsið setti eina heilsíðulýsing av misgávum í hjá JFK – Heilsølu, har Heilsølan ynskti øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

Tílíkt kann altíð koma fyri, tá ferðin er nógv.

### Hugsar náttúrliga nýtt

Olivur elskar at vera úti í náttúruni, er innløgumaður bæði við byrsu og snøri. Møguliga var tað hetta, sum fekk hann at taka stig til, tað sum allar Føroyar tosaðu um, nevniliga at halda Sjómannadag. Hann legði lunnar undir henda fyri føroyingin viðkomandi dag í fjør og fekk aðrar at hjálpa sær soleiðis, at hetta í ár gerst ein upp aftur størri og meiri upplivingarríkur dagur í august mánað. – Heilt náttúrliga liggur hesin dagur í Klaksvík.

### Góða familju

Oliver fekk eina góða konu, Elsu, sum er dóttir Jancy og Jacob Biskopstø. Tey eiga fýra børn, John William, Jastrid, Jacobina og Hannefía, sum øll hava áhuga fyri grafiska- og fjølmiðlaøki, og tvey hava fyribils halga sær henda tátt. Umframt at kenna seg heima her, hava tey veruliga gjørt vart við seg á hesum øki.

Lat meg bert til seinast siga – tað er ikki lætt at skriva um ein so úthaldandi blaðstjóra – at vit, Klaksvík, tað veri seg politiska skipanin her, vinnan, mentanin, handilsskapurin og ikki minst ítrótturin hevur so nógv at takka tykkum fyri.

Hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum og mong góð ár á knøttunum og eina hjartaliga tøkk fyri tann týdning tú og tíni hava havt fyri Klaksvík og Norðoyggjum. Tit siga sannleikan "vit eru lokalir".

**Jógvan við Keldu**



Lesið Sosialin so eru tit við